# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Beinkrím - kunning og tilbúgving

Mannaættin hevur, alt tað vit vita, verið heimsøkt av ymsum umfarsjúkum og sum flestøllum kunnugt hava hesar sjúkur í ávísum tíðarskeiðum gjørt feigdina um seg. Verstu dømini, ið vit kenna, munnu vera Svartideyði í seinmiðøld og Spanska sjúkan í 1918-19, sum kostaði um fimti milliónir mannalív. Spanska sjúkan byrjaði, so løgið tað ljóðar ikki í Spania, men í USA. Orsøkin til navnið er áhugaverd. Um tað mundið, tá spanska beinkrímið breyt út, var fyrri heimsbardagi enn ikki heilt hasaður av og var tí strangur sensurur í øllum krígsførandi londum. Spania var ikki uppií heimsbardaganum og har var tí eingin pressusensurur. Av hesi orsøk var mest skrivað og upplýst um beinkrímið í Spania, og hetta fekk almenningin í Europa at halda, at sjúkan var byrjað har.

Henda søgan sigur nakað um pressuna, og hon lýsir, hvussu nógv heimurin er broyttur seinastu hundrað árini. Í dag vildi tað verið óhugsandi, at heimurin ikki alt fyri eitt var kunnaður um eina so álvarsama sjúku. Samskiftis- og kunningartøknin hava gjørt, at at kalla einhvør hending er alkunnug øllum heiminum at kalla í somu løtu, sum hendingin fer fram. Hartil kemur, at vit takkað verið altjóða samstarvi, eitt nú umvegis ST, hava samstarvsstovnar, ið ansa eftir og taka sær av eitt nú umfarssjúkum, ið kunnu hótta mannaættina. Meginstovnurin er WHO, ið fleiri ferðir hevur sýnt stórt virkisføri, tá álvarsamar umfarsjúkur hava verið um at breiða seg til allan heimin.

Týdningurin av hesum altjóða samstarvi kann ikki yvirmetast. Eisini londini hvørt sær hava tilbúgvingarskipanir, og eingin ivast í, at avvarðandi myndugleikar í landinum gera sítt besta til tess at byrgja fyri ella at minka um avleiðingarnar av eitt nú einum heimsumfatandi beinkrími. Vit hava frá heilsumálaráðharranum fingið at vita, at vit eru væl fyri og at vit tilbúgvingarliga eru enntá betri fyri enn okkara grannalond. Vit hava ein fastan tilbúgvingarbólk, ið fer til verka, so skjótt nakað álvarsamt á hesum øki hendir úti í heimi. Frá landslæknanum hevur almenningurin fingið at vita, at tilbúgvingarbólkurin hevur sín fyrsta fund komandi hósdag. Tá hugsað verður um, hvussu skjótt borið verður at í øðrum framkomnum londum, og at sjúkan er staðfest í Skotlandi, sum er eitt av næstu grannalondum, kann tað undra, at vit geva okkum so góða tíð.

Ein skal sjálvsagt vara seg fyri at loypa ótta á fólk og fyri ikki at tala um at skapa nakran panikk. Hinvegin hevur almenningurin krav uppá kunning – kunning um sjúkueyðkenni, kunning um fyribyrging, kunning um, hvussu ein best sleppur ígjøgnum sjúkuna, kunning um hvørjir møguligir vandabólkar eru og kunning um, hvussu føroyska samfelagið ítøkiliga er fyrireikað, um talan verður um eina veruliga pandemi. Higartil hava myndugleikarnir ikki verið serstakliga nógv frammi ella kunnandi, og uttan at lasta nakran loyva vit okkum at halda, at almenningruin kundi verið betri kunnaður.

**Sosialurin**

## Sakni langtíðarætlanir á eldraøkinum!

ÁSA OLSEN



Ætlaði ikki at leggja meg út í kjakið um støðuna á eldraøkinum, men av tí at eg saman við øðrum var við til at gera eldraálitið, ið varð handað landsstýrismanninum í almannamálum í 2002, haldi eg tó, at eg skal gera nakrar viðmerkingar.

Táverandi landsstýriskvinna í Almanna- og heilsumálum, Helena Dam á Neystabø, setti ein bólk við hesum málsetningi:

1. Hvussu tryggja vit umsorgan og røkt av gomlum, og hvussu skal ábyrgdin býtast millum landsmyndugleikar og kommunalar myndugleikar?
2. Hvussu skipa vit ellis- og røktarheimsøkið?
3. Hvussu skipa vit sambýlis- og vistarheimsøkið?
4. Hvussu skipa vit okkum viðvíkjandi bygging av eldraíbúðum?
5. Hvussu skipa vit dagtilhald o.a fyri eldri?

Miðast skal eftir, at uppgávu-, heimildar- og ábyrgdarbýti fylgjast, tá ið avgerð skal takast um, hjá hvørjum uppgávan skal liggja. Tað er av stórum týdningi, at arbeiðsbólkurin metir um, hvussu vit forða fyri dupultumsiting og øðrum dupultum ella fleirfaldaðum fyriskipanum.

Tað, sum breið semja tykist vera um, er at virka verður fyri, at avstandur millum borgara og myndugleika er so stuttur sum møguligt, at borgarin kennir seg viðurkendan sum tann, ið best veit um egnan tørv, at borgarin veit um tey rættindi, sum hann hevur.

Miðað verður eftir, at tilmælið verður handað landsstýrismanninum áðrenn 1. februar ár 2001.

Í nevndina vóru eftir ynski frá landsstýriskvinnuni vald:
1. Karla Einarson, Landsfelag pensjónistanna.
2. Tordur Niclasen, Ráðið fyri Røktar- og ellisheimsleiðarar.
3. Jacob Vestergaard/Mia Petersen, Føroya Kommunufelag.
4. Jákup H. Foldbo, Heimarøktin & Serforsorgin.
5. Ida Sørensen, Heimarøktin og Serforsorgin.
6. Ása Olsen, Heilsujálparafelag Føroya
7. Eyðun Jensen, Kommunusamskipan Føroya
8. Kristjan Árnason, Almanna- og Heilsumálastýrið
9. Hilmar Høgenni, Løgmansskrivstovan

Arbeiðsbólkurin hevði sín fyrsta fund 24. oktober 2000.

Nevndin gjørdi eitt sera umfatandi arbeiði, har táverandi støða á eldraøkinum varð gjørd upp, somuleiðis vóru framrokningar gjørdar fyri at fáa greiðu á framtíðar tørvi á eldraøkinum.

Táverandi støða vísti, at bráfangistørvur var á 122 røktarheimsplássum, 119 plássum fyri minnistveik, og 75 sambýlisplássum. Nakað av hesum tørvi varð nøktaður við at 3 sambýlir vóru liðug í Eysturoy, eitt í Klaksvík, Eysturoyar Røktar- og ellisheim varð útbygt við 24 búplássum, heim fyri minnisveik opnaði í Eysturoy, Tjarnagarður varð liðugur og sambýlið Vallalíð fyri minnisveik varð liðugt.

Framrokningar vístu, at bráfangistørvurin 2009 kom at vera á 325 røktarheimsplássum, 166 plássum fyri minnisveik, og 201 sambýlisplássum. Tá hugt verður eftir, hvar størsti tørvurin var í 2002 og hvar størsti tørvurin er í dag er greitt, at hann er í Suðurstreymoy. Um vit hyggja eftir, hvar flestu búpláss innan eldraøkið eru útvegaði í mun til íbúgvaratalið, síðan eldraálitið varð handað, er tað ikki í Suðustreymoy, men Eysturoy og Streymnes.

Framrokningar fyri 2015 vísa, at bráfangis tørvurin verður á 388 røktarheimsplássum, 177 plássum fyri minnisveik og 254 sambýlisplássum.

Hesar framrokningar halda rættiliga væl, um vit skulu fara eftir tí, ið hevur verið ført fram hesa seinastu tíðina.

Høvuðsendamálið við eldraálitinum var helst at gera ein leist, fyri at leggja eldraøkið út til kommunurnar at umsita. Fyri at tryggja góðskuna á røktini á eldraøkinum, skuldi ein rammulóg gerast, ið tryggjaði hesi viðurskiftir. Tað, ið skuldi liggja eftir hjá almenna myndugleikanum var ein faklig eftirlits- og ráðgevingaruppgáva.

Ein ynskti somuleiðis samskipa heimarøkt og røktarheimsrakstur.

Tíverri var skift út í Landstýrinum, tá ið eldraálitið varð liðugt, og hevur lítið og onki verið at hoyrt til hetta álitið síðan.

Nú ágangurin á nýggju landsstýriskvinnuna í Almannamálum hevur verið rættiliga stórur hesa seinastu tíðina, har hon hevur fingið til uppgávu, at finna eina loysn her og nú á økinum, vísir hetta bert, hvussu vit aftur og aftur seta bólkar niður fyri at gera uppskot og tilmælir uttan at fylgja teimum.

Um eldraálitið varð brúkt sum tað skuldi, hevði politiski myndugleikin beinanvegin tá tikið stig til, at leggja langtíðarætlanir, bæði fyri bygging av stovnsplássum, og útbygging av verandi tænastum sum t. d. úbygging av Heimatænastuni, so hevði ein ikki verið komin í hesa støðuna.

Alt eg kann minnast hevur verið tosað um at seta í verk døgnrøkt, og tí er tað sera gleðilig at frætta, at komið er har til, at søkt verður eftir fólki til hetta arbeiði. Tó er tað spell, um hetta merkir, at aðrar tænastur skulu skerjast.

Størsti tørvurin á búplássum er í Suðurstreymoy, og var hann eisini størstur, tá ið hesar framrokningar vóru gjørdar, so at rokna við at nýggja landstýriskvinnan í Almannamálum skal loysa trupulleikan uppá nakrar fáar dagar, er at seta órímilig krøv.

Her eiga allir, bæði lands og býráðspolitikarar at taka í egnan barm. Um ikki nakað munagott hendir og seriøsar framtíðarætlanir blíva lagdar, stendur støðan bert við og versnar. Sum áður nevnt, eru tølini fyri 2015 enn verri enn fyri 2009, so her skal veruliga politiskur vilji til fyri at loysa støðuna.

Tórshavn hin 26, apríl 2009

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.